TOYOTA

# Til plátuverkstaðin sóknast vit eftir einum lærlingi at byrja skjótast til ber.

Plátuverkstaðurin umvælir nærum allar plátu og karossarískaðar

Lærlingurin fær breiða og holla upplæring í upprætting av buglum, bonkarbeiði og annað ísamband við skaðaarbeiði á einum av landsins størstu verkstaðum. Lærutíðin umfatar tekniskan skúla og verktligt arbeiði undir eftirliti av einum læru-meistara.

Vit leggja dent á gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Hinvegin krevja vit, at starvsfólk í størst møguligan mun, kunnu arbeiða sjálvstøðugt samstundis sum tey eru partur av einum toymi, har aðalmálið er valaverk til ein nøgdan skara av viðskiftafólki.

Eru spurningar um lærplássið til starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Páll av Teiginum ella Eivind av Reyni. Umsóknir skulu innan 1. Apríl sendast til:

Reyni Service
Páll av Teigum ella Eivind av Reyni.
Vegurin langi
188 Hoyvík

TEAM85



Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

TOYOTA

# Til bilasølu okkara leita vit eftir einum starvsfelaga at taka lut í søluarbeiðinum.

Bilasølan á Reyni Service, ið er ein av landsins størstu, umboðar bilamerkini Toyota og Lexus. Haraftrat umboðar fyritøkan Castrol smyrjiolju og Tidy Car konseptið til reingerð av bilum.

Fyri at styrkja um tænastustigið, sóknast vit eftir einum íðnum persóni, ið hevur royndir við sølu og tænastuveitingum. Viðkomandi fer at kunna gera seg galdandi í menningini av søluliðinum, eins væl og støðugu dagføringini av fyritøkuni.

Vit bjóða eitt professionelt arbeiðsumhvørvi við hartilhoyrandi avbjóðingum og frælsi. Afturfyri rokna vit við, at uppgávurnar verða loystar til fulnar og at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt og samstundis vera partur av einum toymi.

Persónliga ert tú fyrikomandi, dámar væl at fáast við fólk, at leiðbeina, ráðgeva og at kunna taka eina støðu, ið tekur støði í gerandisdegnum hjá kundanum.

Sølufólkið verður lønt eftir nærri avtalu. Meira upplýsing um starvið fæst við at venda sær til Eivind á Reyni á tlf. 353040.
Umsókn, við viðkomandi skjølum, ið skal verða okkum í hendi innan 1. Apríl, skal sendast til:

Reyni Service
Ronny í Lon ella Eivind av Reyni
Vegurin Langi
188 Hoyvík

TEAM85



Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

# Shell sóknast eftir bilførara

Eitt starv sum tangabilførari hjá Føroya Shell í Havn er leyst at søkja at seta sum skjótast.

**Tann, vit leita eftir**
Er nærlagdur og leggur dent á trygga koyring og góða kundatænastu. Stórt koyrikoyrt er krav, og umsøkjarar, ið eru vanir við tunga ferðslu, hava fyrimun.

**Vit kunnu bjóða**
Góðar arbeiðsumstøður og løn sambært sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Andrias Jacobsen á telefon 34 74 00.

Hevur hetta tín áhuga, send okkum umsókn tína sum skjótast, annaðhvørt til:
Føroya Shell, postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo

REPROZ



**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

**Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn**
**Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo**

**Norðoyatunnilin**



# Ókeypis at koyra 10. mars

Frá leygardegnum 10. mars kl. 6.00 til sunnudagin 11. mars kl. 6.00 verður frítt at ferðast gjøgnum Norðoyatunnilin.

www.sansir.fo

NORÐOYATUNNILIN
Skansavegur 7, Postrúm 1010, FO-110 Tórshavn, Tel 350200, Faks 350201, www.tunnil.fo